UTTAN ÚR HEIMI

## Sendistovur fáa hóttanir

Fleiri útlendskar sendistovur í Stockholm hava fingið hóttanir, sum eru vendar ímóti USA og hinum londunum, sum hava hermenn í Irak.

Tað sigur ein embætismaður á sendistovuni hjá Filipsoyggjunum. Hann sigur við svenskar fjølmiðlar, at fólk hóitta við hevndarálopum á londini, sum hava hermenn í Irak, men meiri vil hann ikki siga. Avstralska sendistovan í Stockholm váttar, at hon hevur fingið eitt hóttanarbræv. Brævið var á arabiskum máli, men av tí at tað ikki er týtt til enskt enn, dugir sendiharrin, Richard Rowe, ikki at siga neyvt, hvat stóð í tí.

Hvørki tann amerikanska ella tann bretska sendistovan í svenska høvuðsstaðnum vilja siga, um tær hava fingið slík hóttanarbrøv.

## Teir duga ikki við kvinnum

Ein kanning í USA vísir, at hvørki av teimum báðum forsetavalevnunum, George W. Bush og John Kerry, duga at fáa samband við teir kvinnuligu veljararnar.

Lifetime Television, sum hevur gjørt kanningina, sigur, at hvørki Bush ella Kerry duga at seta seg inn í viðurskiftini hjá kvinnunum, og at teir eru púra sørir, tá tey snýr seg um tær ungu kvinnurnar. Minni enn 10 prosent av kvinnunum halda, at Bush og Kerry skilja teirra trupulleikar, og sambært Lifetime Television sigur tað eitt sindur um, hví næstan 60 prosent av teimum ivingasomu veljarunum eru kvinnur.

Kortini er tað ein sannroynd, at á einum amerikonskum forsetavali eru tað serliga kvinnurnar, sum fara í valhølið. Á valinum fyri fýra árum síðani vóru næstan átta milliónir fleiri kvinnur enn menn á vali. USA hevur ongantíð havt eina kvinnu í forsetaembætinum, og næstan 20 prosent av kvinnunum siga í kanningini, at tær vænta heldur ikki, at ein kvinna kemur í forsetaembætið.

## Danmark skal verja laks

ES krevur nú, at teir donsku myndugleikarnir skulu seta neyðug tiltøk í verk fyri at verja eitt sjáldsamt laksaslag.

Tað snýr seg um eitt serligt laksaslag, sum heldur til í Ribe-ánni har suðuri í Jyllandi. Í mong ár heldu menn, at Ribe-laksurin var útdeyður, men í 1999 staðfestu DNA-kanningar hjá donsku fiskirannsóknarstovuni, at nakrir laksar vóru eftir, men at vandi var fyri, at stovnurin fór at doyggja út.

Síðani hevur ES kravt, at myndugleikarnir skulu verja Ribe-laksin, sum hann ikki doyr út. Tað hava danskir myndugleikar roynt, men sambært Bruxelles er alt ov lítið komið burturúr. Tí hevur ES nú boðað frá, at verður málið ikki loyst skjótt, verður Danmark drigið fyri ES-dómstólin, skrivar Politiken.

## 5.000 km í rullistóli

Tann 65 ára gamli russarin Vladimir Ksenchak kom fyrradagin til Madrid eftir at hava koyrt hagar allan vegin úr Moskva. Teinurin er 5.000 kilometrar.

Vladimir Ksenchak greiddi sponsku tíðindafólkunum frá, at hann hevði verið noyddur at skifta dekkini á rullistólinum tvær ferðir. Tann tyngsti teinurin var at sleppa ígjøgnum fjallalendið ímillum San Sebastian og Madrid, segði hann, men annars hevði ferðin gingið væl. Hann fór úr Moskva tann 11. juni, og á ferðini hevði hann ferðast ígjøgnum Hvítarussland, Póland, Týskland, Niðurlond, Luksenburg og Frakland, áðrenn hann kom til Spania.

Upprunaliga hevði Vladimir Ksenchak ætlað sær at halda leiðina fram til Lissabon, men hann hevur gjørt av at gevast í Madrid. Tá tíðindafólkini vildu hava at vita, hví hann hevði slept tí seinasta teininum, svaraði tann 65 ára gamli russarin, at hann væntaði ikki, at koyristólurin fór at klára ferðina til portugisiska høvuðsstaðin.

# Duttu niður at kalla samstundis



*Tað er sjáldsamt, at tvey flogfør detta niður við so stuttum millumbili sum tey bæði russisku fyrrakvøldið. Myndugleikarnir hava illgruna um yvirgang*

**Tvey flogfør fóru úr Moskva við kós suðureftir. Fyrst datt annað niður. og bara fáar minuttir seinni datt hitt niður. Vanlukkur ella yvirgangur?**

FLOGVANLUKKUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Stutt eftir klokkan 22 fyrrakvøldið misti russiska flogeftirlitið sambandið við eitt Tupolev-flogfar, sum var á veg úr Moskva til Volgograd við 44 fólkum umborð.

Nakrar minuttir seinni sendi eitt annað Tupolev-flogfar fráboðan um rán. Hetta flogfarið var á veg úr Moskva til Sosji við Svartahavið við 52 fólkum umborð, og lítla løtu eftir fráboðanina hvarv flogfarið av radaraskerminum hjá eftirlitinum. Tá var tað nær býnum Rostov.

Nakað seinni funnu bjargingarlið vrakið av tí fyrra flogfarinum nærhendis bygdini Butsjalki einar 180 kilometrar sunnan fyri Moskva. Øll tey 44 umborð vóru deyð. Onnur bjargingarlið vóru tá farin at leita eftir hinum flogfarinum, men ikki fyrr enn tíðliga gjáramorgunin varð vrakið funnið. Tað vísti seg, at øll tey 52, sum við vóru, høvdu latið lív.

Vladimir Putin, forseti, gav í gjár trygdarløgregluni boð um at kanna báðar tilburðirnar. Tað er ikki vanligt, at trygdarløgreglan kannar flogvanlukkur, og boðini frá forsetanum eru tekin um, at myndugleikarnir hava illgruna um yvirgang, skrivar tíðindastovan AFP úr Moskva.

Fólk, sum vóru nærhendis staðnum, har tað seinna flogfarið datt niður, hava greitt frá, at tey hoyrdu eina spreinging, stutt áðrenn flogfarið datt niður.

# Pentagon medvirkaði til píningina í Irak

**Ein óheft kanningarnevnd er komin til ta niðurstøðu, at tann ovasta amerikanska herleiðslan má átaka sær sín part av skyldini av tí, sum hendi í Abu Ghraib-fongslinum**

FANGAVIÐFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani myndirnar av irakskum fangum og amerikonsku fangavørðum teirra fóru um allan heimin í apríl, hava amerikanararnir skipað fyri fleiri kanningum fyri at fáa staðfest, hvat hendi, og hvør hevði ábyrgdina.

Tann frágreiðingin, sum verður hildin at vera tann týdningarmesta, er nú liðug. Ein óheft nevnd við fyrrverandi verjumálaráðharranum James Schlesinger á odda kemur sambært New York Times til ta niðurstøðu, at leiðandi persónar í Pentagon og amerikonsku herleiðsluni medvirkaðu til tað, sum hendi í Abu Ghraib.

Nevndin sigur ikki beinleiðis, at Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, ella hansara næstu menn høvdu givið boð um at pína teir irakskukakku fangarnar. Men nevndin sigur, at teir høvdu als ikki eftirlit við tí, sum hendi fangunum í Irak, og at tað sama er galdandi fyri fangar í Afghanistan.

Um generalin Ricardo Sanczhes, sum var ovasti í Irak um tað mundið, sigur nevndin, at hann fór alt ov lætt um frágreiðingarnar, sum hann fekk um fangapíningina í Abu Ghraib. Sambært Washington Post er generalurin eisini fyri hvøssum atfinningum í einari aðrari frágreiðing, sum ætlandi skuldi almannakunngerast í gjár.

Amerikanska herleiðslan hevur eisini gjørt sínar kanningar í sambandi við fangaviðferðina. Har er niðurstøðan, at fangavørðarnir fóru út um mark, men sambært New York Times heldur tann óhefta kanningarnevndin, at so einfalt er málið ikki. Nevndin sigur, at eisini tann ovasta herleiðslan sveik.

### Syndabukkur

Higartil eru sjey amerikanskir hermenn ákærdir fyri at hava farið illa við irakskum fangum. Verjin hjá einum teirra kravdi týsdagin, at Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, skal vitna í málinum, men hesum vísti dómarin aftur. Verjin vil vera við, at teir ákærdu hermenninir gjørdu ikki annað, enn teir høvdu fingið boð um.

– Tað er láturligt at halda, at hesir hermenninir gjørdu nakað, sum leiðsla teirra ikki hevði góðkent frammanundan, sigur verjin, Guy Womark, við New York Times.



# Breiðka innsiglingina á Havnina


*Tórshavnar Havn arbeiðir í løtuni við at breiðka innsiglingina á Havnina*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Um góðan mánað verður innsiglingin á Havnina breiðkað við 65 metrum.**

DÝPING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Um góðan mánað verður høgligari at sigla á Havnina Tórshavnar Havn arbeiðir í løtuni við at dýpa innsiglingina á Havnina við 65 metrum.

– Tá eitt ferðamannaskip liggur við molan, og eitt nú Norrøna skal leggja lat, gerst ofta trongligt at koma inn á Havnina. Eftir dýpingina verður innsiglingin breiðkað økt úr 105 metrum til 170 metrar, og tá verður lættari at leggja at, sigur Arnbjørn Christiansen verkfrøðingur

Fyri góðum tveimum árum síðan varð dýpt frá molanum út á boyuna, sum er fest føst miðskeiðis á Havnarvág. Ætlanin er nú at dýpa frá boyuni og inn á Viðanes.

Farið var undir arbeiðið mánadagin, og Arnbjørn Christiansen væntar, at at arbeiðið fer at taka góðar fýra vikur.

## Javnaðarmenn hittast

Í gjár komu og í dag koma umboð fyri SAMAK til Føroyar. SAMAK er samstarvsnevndin hjá norðurlendsku arbeiðararørsluni. Ætlanin hjá SAMAK við ferðini er at hitta limir í Føroya Javnaðarflokki. Við á ferðini eru Peter Palshøj, aðalskrivari í SAMAK, og Jens Christiansen, skrivari í danska javnaðarflokkinum. Umframt fundir við løgmann og umboð fyri javnaðarflokkin verður eisini skipað fyri úferðum.


*Maðurin steig á ein av rútunum í tekjuni, tá teir arbeiddu við at skifta takið á bygninginum hjá Farmaleiðum*
*Mynd: Jens Krisitan Vang*

# Datt 10 metrar

Ein 17 ára gamal unglingi breyt annan skøvningin og báðar armar, tá hann mikumorgunin var fyri eini arbeiðsvanlukka við Eystaru bryggju í Havn.

Men sambært vakthavandi á Politistøðini, so kundi skaðin verið munandi størri. Arbeitt verður í løtuni við at skifta takið á bygninginum hjá Farmaleiðum, og tað var her, at óhappið hendi.

Maðurin hevur eftir øllum at døma ikki veið nóg ansin, og hevur stigið á eina plátu av plexi-glas. Hendan bar ikki vektina hjá manninum, sum datt teir 10 metrar av takinum og niður á gólvið.

– Vit kunnu bara staðfesta, at maðurin hevur verið ómetaliga heppin. Hann hevur nýtt armarnar at taka fyri seg í fallinum, og tað hevur so kostað brotini, men umframt tað, so er talan bert um nøkur prus í andlitinum, staðfestir vakthavandi á politistøðini.

Løgreglan sigur annars, at teir gera sína rapport um málið, og at tað annars verður Arbeiðseftirlitið, sum kannar málið víðari.

**-jm**

ÚTSØLA
ÚTSØLAN BYRJAR
LEYGARDAGIN 28. AUGUST KL. 09.00
OPIÐ TIL KL. 17.00
Pf. FÓTBÚNI
TRÓNDARGØTA 23 • TLF. 31 17 05
EURO SKO
EURO SKO